# Søkt verður eftir KT-infrastruktur serfrøðingi




**Vilt tú arbeiða á einum stinnum liði har tað fakliga er í miðdeplinum, eitt stað har tínir starvsfelagar eisini eru tínir vinir?**

Søkt verður eftir KT-infrastruktur serfrøðingi, ið er klár/ur til nýggjar avbjóðingar.

Starvsøkið fevnir einamest um installatión, ráðgeving og brúkarahjálp innan virtualisering, storage og infrastruktur.

Sum persónur ert tú fyrikomandi, hevur lætt við at tosa við fólk og ert álitisvekjandi. Tú sært loysnir heldur enn trupulleikar, og tú hevur evnini at koma frá tørvi kundans til røttu loysnina.

Vit vænta, at tú hevur certificeringar/góðkenningar og/ella fleiri árs royndir innan virtualisering, storage og infrastruktur umframt vilja og hegni at læra meira innan hesa tøkni t.d. innan Microsoft System Center familjuna.
Vit bjóða eitt spennandi arbeiðsumhvørvi, har vit arbeiða tvørtur um fakmørk, og har fakligu avbjóðingarnar eru á hásæti og saman við tínum nýggju starvsfelagum gongur tú eini spennandi yrkisleið á Formula í møti.

Góðir møguleikar eru fyri persónligari menning, og vit leggja stóran dent á eftirútbúgving, ið gevur altjóða góðkenningar innan økið. Vit bjóða eina kappingarføra løn, sum verður ásett eftir royndum og útbúgving.

Umsóknir við prógvum skal sendast til Eyðun Thorsvig á teldupostadressu et@formula.fo. Eru spurningar til starvið, ert tú vælkomin at senda ein teldupost til áðurnevndu teldupostadressu ella ringja 344145.

Umsóknarfreistin er:
**Mánadagin 6. juni 2011.**

©2011 | 1XPETUR.COM

**Stutt um Formula:** Okkara aðalmál er at virka fyri at okkara viðskiftafólk fáa økt kappingarføri. Virksemið hjá Formula er skipað í vitarnareindir har góðskan verður tryggjað umvegis altjóða góðkenningar. Á Formula starvast 70 starvsfólk, og vit hava hølir í Tórshavn, Runavík og Keypmannahavn. Formula er eitt fíggjarliga trygt virki við eini eginfígging á 60% og einum gjaldførislutfalli á 355. Á Formula eftirmeta vit áhaldandi okkara virksemi, bæði umvegis kundanøgdsemiskanningum og búskaparligum úrslitum.

formula

Formula | Stiðjagøta 11 | Postboks 1078 | FO-110 Tórshavn | Tel (+298) 344000 | www.formula.fo




Hug til avbjóðandi og spennandi útbúgving á einum mennandi og modernaðum arbeiðsplássi? Eik sóknast eftir ágrýtnum og ábyrgdarfullum liðleikarum til næmingaliðið

Sum næmingur í Eik verður tú partur av væl samanspældum toymum av professionellum og ágrýtnum fólki, sum hvør á sín hátt eru við til at gera Eik til eitt avbjóðandi, mennandi og spennandi arbeiðspláss. Vit leggja dent á toymisanda og ábyrgdartilvitan. Vit líta á hvønn annan og stuðla hvør øðrum.

Vit sóknast eftir næmingum, sum ætlandi fara at arbeiða á deildum okkara í Fuglafirði, Klaksvík, Tórshavn, Miðvági, á Norðskála og Saltangará.

**Næmingatíðin**
Í Eik fært tú eina fjølbroytta og avbjóðandi útbúgving innan nútíðar peningastovnsvirksemi. Tú fært kunnleika til at veita kundum okkara ráðgeving og tænastur í einum professionellum og kundavendum umhvørvi. Næmingatíðin er 2 ár.

**Útbúgving**
Tú ert við í prógvgevandi lærugreinum, samstundis sum tú gongur í peningastovnsskúla. Í skúlatíðini hittir tú aðrar næmingar og fært høvi at sparra og fáa íblástur frá teimum.

**Krøv**
Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HF- ella tilsvarandi prógv. Næmingar, ið taka prógv í summar, eru eisini vælkomnir at søkja.

Fleiri upplýsingar um næmingastørvini fáast við at venda sær til Margrethu Rustin Heinesen, tel: 348514, teldupost: margretha.heinesen@eik.fo

Les meira á www.eik.fo og www.18-25.fo

Send umsókn við avriti av próvskjølum umvegis heimasíðuna, ella til adressuna nevnda niðanfyri, so hon er okkum í hendi í seinasta lagi 17. mai 2011.

Eik Banki Føroya
Att.: Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðari
Postboks 34
110 Tórshavn

Estra